## Føroyar fyri mismuni

Formaðurin í Útnorðurráðnum, Henrik Old, vil hava íslendingar at broyta lóggávuna, so lodna, sum føroysk skip veiða í íslendskum sjógvi, kann landast til frystingar í Føroyum ella frystast umborð á føroyskum skipum. Í vikuni skulu føroyingar og íslendingar samráðast um fiskiveiðirættindi í 2007, og í tí sambandi hevur Henrik Old sendi íslendsku samráðingarnevndini bræv, har hann biður nevndina ávirka íslendsku politikararnar.

## Bókasavnið flutt

Nes kommuna er farin undir at umbyggja og útbyggja skúlan á Toftum út, og tað hevði við sær, at bókasavnið í bygdini mátti lata aftur í oktober. Síðani hava fólk í kommununi ikki havt nakað bókasavn, men frá í dag kunnu tey aftur læna bøkur. Kommunan hevur flutt bøkurnar í gamla handilin í Oyrunum á Toftum, og har verður bókasavnið fyribils. Bókasavnið í Oyrunum er opið mánadag kl. 16 til 18 og mikudag kl. 19 til 21.

# Ógvusligur eldur á Trongisvági

**Fríggjakvøldið brendi gamla Statoilstøðin á Trongisvági í grund. Ein stór spreinging hoyrdist og eldurin var øgiligur. Løgreglan fær onki sagt um orsøkina enn, og fer at kanna málið gjøllari seinnapartin í dag**

LØGRELUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Eyð-britt Tjaldrastein tók hesa myndina av ógvusliga eldinum í Trongisvági fríggjakvøldið, tá gamla Statoilstøðin brendi í grund*

Klokkan 20.58 fríggjakvøldið fekk løgreglan í Suðuroy fráboðan um, at eldur var í gomlu Statoilstøðini á Trongisvági, sum er beint við síðuna av gamla atløguplássinum hjá Smyrli á Drelnesi.

Tá stóðu húsini longu í ljósum loga. Eldurin var bæði stórur og ógvusligur, og ein spreinging hoyrdist eisini inni úr húsinum.

- Hetta er størri enn nýggjársbálið, ljóðaði ein viðmerking av Tvøroyri um eldin.

Bygningurin sum brendi, hevur áður verið statoilstøð, men hevur í nøkur ár staðið partvís tómur, ella nýttur til onnur endamál.

Leingi brann bara síðubygningurin, av tí at nógvi vindurin førdi eldin burtur frá høvuðsbygninginum. Í vestara enda í høvuðsbygninginum stóð ein oljubilur. Hann varð fingin út, júst sum eldurin breiddi seg.

Oddur Dimon, sløkkiliðsleiðari, segði við Suðuroyarportalin, at hetta var sera djarvt av bilføraranum, og stutt eftir hetta var allur bygningurin eitt eldhav.

Klokkan 22.30 høvdu teir tamarhald á eldinum, og Oddur Dimon metir, at eftir umstøðunum gekk sløkkiarbeiðið væl.

### Brendi í grund

Men hóast sløkkiarbeiðið gekk væl, so er lítið gott eftir har bygningurin stóð.

Eftir standa betongelementini og ein partur av uttara enda av bygninginum, har handilshølið var. Uttan fyri stendur ein uppkolaður lastbilur, inni í høvuðsbygninginum standa maskinur, onkur bátur, trukkur, ein niðurfallin tekja, jarnbjálkar hvørt um annað, alt brent til ein bunka av burturkasti.

Síðubygningurin, har eldurin byrjaði, er burtur. Ongin gassfløska var á staðnum, so spreingingin, ið var í eldinum í gjárkvøldið, stavaði ikki frá henni.

Skaði fyri meiri enn eina millión

Tá Sosialurin tosaði við løgregluna í Suðuroy í morgun, var enn ógreitt hví eldurin kyknaði, men teir skulu út at gera nærri og gjøllari kanningar seinnapartin í dag, og fyrr enn tá fingu teir onki sagt um nakra møguliga orsøk.

Tó segði løgreglan seg kunna útiloka, at eldurin var ásettur við tí fyri eyga, at fáa okkurt burtur úr í fíggjarliga, tí næstan onki í bygninginum var tryggjað. Enn ber eisini illa til at siga, hvussu nógv skaðin hevur kostað í krónum og oyrum, men løgreglan í Suðuroy sigur, at lítið er at ivast í, at skaðin samanlagt er omanfyri milliónina.

## Oljuútgerð hjá OSR fór í eldinum

ELDUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Leygardagin kom eldur í Shellgoymsluna í Trongisvági í Suðuroy. Í bygninginum var eisini væl av útgerð hjá føroyska offshorefelagnum OSR, ”Oil Spill Response” við Paula Einarson og øðrum. Sum skilst fór øll útgerðin í eldinum, her var talan um bát og truck og annað. OSR fekk uppgávuna at standa fyri tilbúgvingini í sambandi við Brugdubrunnin í fjør og hevur option at taka sær av hesi uppgávu fyri BP samtak, sum fer at bora í summar. Sum skilst er enn ikki greitt, hvørja avleiðing hetta fær fyri OSR og komandi boring. Nú skal fyrst staðfestast, hvat er farið og hvat er tryggjað. Pauli Einarson sigur, at hetta er sera óheppið men hann fer so at kanna umstøðurnar skjótast. Ætlanin er framvegis at átaka sær uppgávuna at standa fyri tilbúgvingini í sambandi við Williamboringina a landgrunninum í summar. Ein partur av útgerðini til hesa uppgávuna er so í løtuni í Noregi og umborð á skipum, og skal hon so koma til Føroya, tá boringin nærkast.

# 12 mistu koyrikortið

**Ikki færri enn tólv fólk mistu koyrikortið um vikuskiftið, sum annars hevur verið av teimum friðarligu**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Ársins fyrsta vikuskiftið hevur verið stak friðarligt, verður sagt av løgreglustøðini í Havn í morgun. Og tó, so hevur ferðslupolitiið ikki kett seg. Teir hava verið úti um kvøldarnar í vikuskiftinum, og gjørt ferðmátingar. Serliga leygarkvøldið í Kaldbak høvdu teir ov mikið at takast við, tí ímillum klokkan níggju og hálvgum eitt, mistu sjey koyrikortið treytað og 15 bøtur vóru skrivaðar.

Aftrat hesum sjey fingu fimm onnur eisini eina treytaða frádøming av koyrikortinum. Ein teirra koyrdi ávirkaður, restin koyrdi ov skjótt. Av hesum hevði ein eina treytaða frádøming av koyrikortinum frammanundan, so hesin bilførarin missir nú koyrikortið.

– 12 mistu koyrikortið og tilsamans 60 sakir vórðu skrivaðar, og tað er lutfalsliga nógv, segði vakthavandi á løgreglustøðini í morgun.

Seinastu mánaðirnar hava vit sæð fleiri dømi um ógvusligan harðskap í býnum, og so seint sum seinasta vikuskifti smekkaði onkur eina fløsku í høvdið á einum manni. Men hóast trettanda kvøld var og býurin var fullur av fólki, so vóru tað ikki tey stóru harðskapsmálini, sum órógvaðu arbeiðsorkuna hjá løgregluni hetta vikuskiftið. Onkur smámál vóru og okkurt minni herverk gjørt, so var tað lítið av miklum í mun til onnur vikuskifti.